# Stýrisfundarbók FKF

## 11-05-2010 / 7

*Fundarstað:* Kvívík

*Fundur byrjar kl:* 10.00

*Fundur lokin kl:* 12.00

| Stýrislimir | Viðmerking |
|---|---|
| Karl A. Olsen | |
| Johan Christiansen | |
| Herálvur Jacobsen | |
| Hans Jákup Kallsberg | |
| Delmar Tausen | |
| Dánjal Jákup Jakobsen | Avboð |
| Albert Ó. Ellefsen | |
| Jógvan K. Mørkøre, varaform. | Avboð |
| Asbjørn Djurhuus form. | |

**Fundarmál nr: 30**

FKF Jour. nr: 09-090

Reist av: Vinnunevnd Løgtingsins

Fundarmál: Haugers styrelse og drift

Málslýsing: Í telduposti dagf. 13. april, bjóðar Vinnunevnd Løgtingsins felagnum at viðmerkja broytingaruppskot til Lógina um haugers styrelse og drift. Sí skjøl 30_1 og 30_2.

Bólkuring fyri teknik og umhvørvi fekk málið til ummælis og hevði hann viðmerking til 2) §37, stk. 3, har orðingin um hvør móttekur endurgjald fyri mist bit. Bólkurin mælir Vinnunevnd Løgtingsins til orðingina: endurgjaldsupphæddin verður goldin haganum.

Fundarsamtykt: Aðrar viðmerkingar: innsenda viðmerkingin átti at verið til alt uppskotið heldur enn bert tað eina pettið.

*Støða: Hoyringssvar FKF jour nr 09-91_2.1 sent Vinnunevndini 26. april 2010.*

**Fundarmál nr: 31**

FKF Jour. nr: 09-091

Reist av: MLF

Fundarmál: Musikskúlin og arbeiðsumstøður

Málslýsing: Uppafturtikið frá seinasta fundi, har málið var beint í mentanarbólkin (MS). Sí skjal 31.

Viðmerkingar frá MS:
Vit vóru samdir um, at hvørki FKF ella KAF kann leggja krøv á kommunurnar um setanarviðurskifti ella hølisviðurskifti, men vit mæla til, at kommunurnar verða kunnaðar um ynskini frá MLF.

Vit mæla tó til at bíða við at kunna kommunurnar, til KAF og FKF hevur kannað onnur viðurskifti á økinum. Her verður m.a. hugsað um frágreiðing frá KAF um lønarviðurskifti hjá musikkskúla-leiðarunum í løtuni, spurnarbløð eru send, men KAF hevur ikki enn viðgjørt tey.

Vit halda eisini, at FKF (mentanarnevndin) skal kanna verandi umstøður, m.a. hølisviðurskifti, játtan til ljóðføri o.tíl., næmingatøl, undirvísingartíð.

Tá neyðugir upplýsingar eru fingnir til vega, kann mentanarnevndin gera tilmæli, hvussu viðurskiftini hjá musikkskúlaleiðarum kunnu

skipast.

Fundarsamtykt: Tlmæli frá MS samtykt.

Boða MLF frá at felagið arbeiðir við málinum.

*Støða: Í bíðistøðu.*

**Fundarmál nr: 32**

FKF Jour. nr: 09-092

Reist av: Mentamálaráðnum

Fundarmál: Samstarvsráð FKF, KSF, MMR og Pedagogfelagið

Málslýsing: Í brævi dagf. 28/4 bjóðar MMR felagnum, at gera viðmerkingar til uppskot um samstarvsráð. Sí skjøl 32_ og 32_2.

Á fundum sum MMR hetta seinasta árið hevur havt við Pedagogfelagið, KSF og FKF hevur verði borið upp á mál, at gott hevði verið við einari fastari skipan, har partarnir kunnu viðgera mál av felags áhuga.

MMR hevur gjørt eitt uppskot til eina avtalu um eitt samstarvsráð millum partarnar. Uppskotið er sent pørtunum til ummælis.

Biðið verður um viðmerkingar innan 17/5-2010.

Fundarsamtykt: Um neyðugt er við samstarvsráði, eiga umboðini at vera frá MMR og kommununum, sum hava uppgávuna og ábyrgdina av dagstovnaøkinum.

*Støða: Svarskriv FKF jour nr 09-092_1.3 til MMR 14. mai 2010.*

**Fundarmál nr: 33**

FKF Jour. nr: 02-372

Reist av: Karl Olsen

Fundarmál: Listaleypurin

Málslýsing: Karl Olsen, stýrislimur, hevur 6. mai 2010, heitt á felagið, um at viðgera tilmæli um fígging av Listaleypinum.

Mælt verður til, at samstarvsavtalan um Listaleypin verður longd í eitt ár fram til 31.12.2012, og at fíggingin verður broytt, soleiðis at

partarnir gjalda 200.000 kr hvør og ikki 150.000 kr sum nú.

Orsøkin til hækkingina er, at ætlanin er at víðka skipanina, soleiðis at elstu børnini í dagstovnunum eisini kunnu verða fevnd av tilboðunum frá Listaleypinum.

Fundarsamtykt: Tikið verður undir við tilmælinum.

*Støða: Avgreitt.*

**Fundarmál nr: 34**

FKF Jour. nr: 09-093

Reist av: Skrivstovuni

Fundarmál: Atgongd til kommunalu roknskaparskipanina

Málslýsing: Kommunal roknskapartøl. Kunning um atgongd hjá FKF til roknskapartølini hjá kommununum.

Fundarsamtykt: Stýrið tekur undir við, at skrivstovan hevur atgond til at gera statistikk yvir kommunalu roknskapartølini.

*Støða: Avgreitt við telduposti til Fíggjarmálaráðið 11. mai 2010.*

**Fundarmál nr: 35**

FKF Jour. nr: 09-094

Reist av: Skrivstovuni

Fundarmál: Friðingarlógin, avmarkingar

Málslýsing: Biðið verður um heimild at fáa løgfrøðing at túlka fríðingarlógina v.m. Við atliti til vavið av friðingini.

Fundarsamtykt: Biða um túlking frá løgfrøðingi um hvussu vítt friðingin rekkur, t.d. á privatari ogn.

*Støða: Bíðistøða*